


*Grønlendski oljumálaráðharrin, Karl Ove Berthelsen er spentur uppá eina oljuframtíð og vónar hann, at eisini føroyingar fara at finna olju.*

*Mynd: Jan Müller*

# Grønland nærkast oljuvinnuni

**VINNA** **Grønland gongur eini spennandi framtíð á møti við bæði avbjóðingum og møguleikum. Oljan er bara ein partur av hesum.**

Jan Müller

Hóast ymisk til støddar, so líkjast Grønland og Føroyar í mangar mátar. Fólkatalið er nærum tað sama, og fiskur er framvegis høvuðsvinnan. Bæði londini royna at menna ferðavinnuna.

Tá ræður um nýggjar vinnur í framtíðini, so eru londini eisini sera meinlík. Í báðum londum verður leitað eftir kolvetnum í undirgrundini.

Í Føroyum eru boraðir sjey brunnar, í Grønlandi átta, og kolvetni eru staðfest í báðum londum. Í hesum árinum verða brunnar boraðir bæði í Føroyum og Grønlandi.

Tískil er møguleiki fyri, at báðar tjóðirnar gerast oljulond í hesum árinum, t.v.s. finna keldur við rakstrarverdugum nøgdum av olju ella gassi.

Tað kunnu eisini ganga mong ár aftrat, áðrenn nakað verður funnið.

Og loksins kann eisini henda, at als einki verður funnið.

### Varni

Kortini eru útlitini góð og meta jarðfrøðingar, at olja og gass eru bæði í føroysku og grønlendsku undirgrundini.

Hyggja vit eftir gongdini í grannalondunum, so vórðu nógvir brunnar boraðir, áðrenn rakt varð við.

Grønlendingar eru sum heild jaligir mótvegis eini framtíðar oljuvinnu. Hinvegin eru teir sera varnir og tosa um at halda høvdið kalt og hava ís í búkinum.

Grønlendski landshøvdingin, Kuupik Kleist er skilagóður og leypir ikki framav, tá hann umrøður eina møguliga framtíðar oljuvinnu.

Hann sigur, at Grønland skal taka tað besta frá royndunum hjá øðrum oljutjóðum, og leggur hann alstóran dent á spurningin um at varðveita eitt reint umhvørvi – eisini eftir at oljan er funnin.

### Jaligt

Oljuleiting byrjaði í Grønlandi fyri skjótt 40 árum síðani.

Ikki fyrr enn í fjør var verulig ferð sett á leitingina, tá fleiri nýggj leitiloyvi vórðu latin útlendskum oljufeløgum. Meðan undangongufelagið í Føroyum er norskt, so eru tað skotar, sum ganga fremstir, tá tað um grønlendsku oljuna ræður.

Cairn Energy hevur tikið dyk á seg og boraði í fjør 2-3 brunnar og staðfesti tá eisini, at tað hevði rakt við bæði olju og gass, tó ikki í stórum nøgdum.

Men so jaligt sær út, at felagið í ár fer at bora ikki færri enn fýra brunnar.

### Framtíðin

Tá Sosialurin vitjaði í Grønlandi í fjør fór nýggjasta útbjóðingin av bakkastokki.

Kenslan var, at Grønland eigur stórar nøgdir av olju og gassi í undirgrundini. Hóast vanligi grønlendingurin ikki ger sær so nógvar tankar um eina veruliga oljuframtíð, so verður oljuleitingin høgt raðfest í politisku skipanini, tó at tað alla tíðina verður lagdur dentur á at hava bæði beinini trygt á jørðini.

Grønlendingar ætla sær ikki bara at satsa uppá oljuna sum framtíðar vinnugrein. Eisini alskyns virðismikil mineralir finnast í grønlendsku fjøllunum, og troytan av hesum er eisini partur av framtíðar vinnupolitikkinum. Og síðani er tað ferðavinnan, sum Grønland eisini raðfestur høgt.

Samanumtikið tykist Grønland at ganga eini jaligari framtíð á møti, tá tað ræður um at menna vinnulívið.

Tó at tað eisini eru bogar og sker, eitt nú er mangul uppá útbúgvin fólk og tørvur er á at útbyggja undirstøðukervið.

Grønland gongur eini spennandi framtíð á møti við bæði avbjóðingum og møguleikum. Oljan er bara ein partur av hesum.

jan@sosialurin.fo

# Útnorðurkonsert við Rasmusi og Hanusi

Í dag Norðurlandadagin verður forkunnug útnorðurkonsert í Norðurlandahúsinum við tveimum av mætastu sangarum í útnorði, grønlendska Rasmus Lyberth og føroyska Hanus G. Johansen

Kendi grønlendski sangarin, sangskrivarin og sjónleikarin Rasmus Lyberth fer nú, saman við guittarleikaranum Michael Hansen at halda eina konsert í Norðurlandahúsinum í kvøld, 23. mars kl. 20. Við á konsertini verður eisini Hanus G. Johansen.

Tað er Norrøna Felagið í Føroyum, sum hevur fingið Rasmus Lybert til Føroya, og sum skipar fyri konsertini í tøttum samstarvi við Norðurlandahúsið.

### 60 ár

23. mars er Norðurlandadagur, og Norrøna Felagið í Føroyum heldur í hesum sambandi sín árliga aðalfund í Norðurlandahúsinum.

Eftir sum tað í ár eru 60 ár síðan Norrøna Felagið varð stovnað, valdi nevndin at gera nakað serligt burtur úr Norðurlandadegnum í ár, og bjóðaði Rasmus Lybert at koma og seta dám á dagin við eini konsert saman við føroyska Hanus G. Johansen eftir aðalfundin.

### Um Rasmus Lyberth

Rasmus Lyberth, sum fyllir 60 ár í summar, er tann grønlendingur, sum hevur megnað at koma longst við sínum tónleiki.



Í fleiri áratíggju hevur hann verið ímyndin av grønlendskum sangi og tónlist kring stóran part av heiminum.

Tað er øðrvísi og serligt at hoyra Rasmus Lyberth syngja sínar sermerktu grønlendsku sangir. Rødd hansara hevur ein heilt serligan dám og tónleikur hansara er forkunnugur og kann tykjast fremmandur fyri vesturlendingar.

Rasmus Lybert greiðir frá um sínar sangir við hita og fynd. Nakrir av sangum hansara taka støði í sosialum viðurskiftum, nakrir eru skaptir úr smáum hjartanemandi gerandishendingum og aðrir eru ljóðmyndir av stórbæru og vøkru grønlendsku náttúruni. Hóast tekstirnir eru á grønlendskum, so megnar

Rasmus við rødd og nærveru síni at náa áhoyrarunum so øll fáa okkurt við sær.